# Íslendingur fekk bókmentavirðislønina

**Íslendski rithøvundurin Sjón fekk norðurlendsku bókmentavirðisløn ina 2005 fyri skaldsøguna Skugga-Baldur**

BÓKMENTAVIÐIS-LØN

Íslendski rithøvundurin Sjón ( Sigurjón Birgir Sigurðsson) fekk norðurlendsku bókmentavirðislønina í ár, sigur Norðurlandaráðið í tíðindaskrivi.

Metingarnevndin sigur í grundgeving síni, at Skugga-Baldur er ein passalig blanding av skaldskapi og prosa við evnum úr íslendskum sagnum og romantiskum frásøgukynstri, har eisini nútíðar etisk mál verða tikin upp.

Sjón er føddur í 1962, og Skugga-Baldur er hansara fimta skaldsøga. Umframt hevur hann millum annað givið út yrkingarsøvn, barnabøkur og stuttsøgur.

Norðurlendska bókmentavirðislønin, sum er 350.000,- danskar krónur, verður latin Sigurjóni Birgiri Sigurðsson (Sjón) á Norðurlandaráðsfundi í Reykjavík tann 26. oktober.

Virðirlønin er latin síðan 1962 og er sostatt javngomul við ársins vinnara.

ej




Myndatxt

*Føroyskir handlar eru nú fanir at kanna, hvørt teir liggja inni við nøkrum av vørunum, sum nú eru forbodnar*

*Tilvildarlig modellmynd: Jens Kristian Vang*

# Sósin tikin av hillunum

Týskvøldið kom fram, at fleiri danskir matvøruframleiðarar hava nýtt eina worcestershire sauce við ólóglia litevninum, Sudan 1, í framleiðslu síni.

Danskir miðlar hava gjørt nógv burturúr hesum, men mikudagin hevði Heilsufrøðiliga Starvsstovan í Føroyum tó ikki fingið nakað alment skriv hesum viðvíkjandi.

Erla Jensen á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sigur, at tey vanliga fáa fráboðanir, tá slík evni stinga seg upp, men at eingin slík er komin hesaferð. Starvsstovan vísir tó til heimasíðani hjá danska Fødevarestyrelsen, eins og tey hava givið boð til handlar um at ansa eftir, at vørurnar á listanum hjá donsku myndugleikunum ikki eru á føroyskum handilshillum.

Tey boðini vórðu givin beint fyri døgurða mikudagin, og sum vit hava skilt, so eru føroysku matvøruhandlarnir nú farnir at kanna, hvørt tey hava nakrar av hesum vørum.

– Vit hava júst fingið boðini, so eg veit ikki, um vit hava hesar vørur á goymslu, ella um vit møguliga hava selt nakað. Tað fara vit at kanna nú, og er nakað, so verður tað sjálvsagt tikið av hillini, sigur Dánjal Jespersen í Miklagarði, har tey nú eru um at kanna handilshillarnar.

Í danska tíðindaskrivinum verður niðanfyristandandi vørur givnar upp sum vandamiklar, og heitt verður á fólk, sum møguliga hava keypt hesar, um at koyra tær í skrell.

Samstundis verður sagt, at hóast fólk hava nýtt hesar vørurnar, so er heilsuvandin ikki ræðandi stórur. Talan er nevnliga um ógvuliga smáar mongdir av Sudan 1, sum verða nýttar í hesum.

-jm

**Vørurnar á listanum hjá danska Fødevarestyrelsen eru hesar**

**Frá Arla Foods:**
* Karolines Whisky Sauce.

**Frá Jensen's Foods:**
* Jensen´s Whisky sauce. Mindst holdbar til 21.06.2005
* Jensen´s Cognac sauce. Mindst holdbar til 21.06.2005
* Jensen´s Favorit sauce. Mindst holdbar til 21.06.2005
* Jensen´s Peber sauce. Mindst holdbar til 21.06.2005
* Whisky sauce. Mindst holdbar til 21.06.2005
* Steak sauce. Mindst holdbar til 21.06.2005

**Frá Kolding Salater:**
Selt til Fakta og Liva handilsketurnar
* Steak sauce, med holdbarheder frem til 16.06.2005
* Whisky sauce, med holdbarheder frem til 16.06.2005

**Frá Bähncke A/S:**
Vørurnar eru bert seld catering-marknaðinum í tíðarskeiðinum 1. apríl 2004 til 18. februar 2005-02-23
* Bähncke Tomat Ketchup 125 x 20 g mindst holdbar fra - til 28.01.05 16.09.05
* Sunset Boulevard Ketchup 20 g Mini Pose mindst holdbar fra - til 04.03.05 15.10.05
* Bähncke Power Tomat Ketchup 6 x 900 g mindst holdbar fra - til 14.01.05 18.10.05
* Bähncke Power Tomat Ketchup 1 x 11 kg mindst holdbar fra - til 06.03.05 25.09.05
* Bähncke Power Tomat Ketchup 1 x 4,25 kg (Bag in Box) mindst holdbar fra - til 03.02.05 16.08.05
* Bähncke Barbecue Sauce 1 x 4,25 kg (Bag in Box) mindst holdbar fra - til 19.01.05 26.09.05
* Bähncke Barbecue Sauce 6 x 900 g mindst holdbar fra - til 26.01.05 22.09.05
* Bähncke Barbecue Sauce 1 x 5 kg mindst holdbar fra - til 22.02.05 02.08.05

**Frá Crown-Food:**
* Peber sauce 335 ml glas til Irma, DETAIL Irmas Pebersauce
* Produceret 23.12.2004 mindst holdbar til 23.12.2005
* Produceret 18.11.2004 mindst holdbar til 18.11.2005
* Produceret 29.10.2004 mindst holdbar til 29.10.2005
* BBBQ Sauce 8 kg seld til Tasty Brand Restaurantketuna. Mindst holdbar til 23.02.2005 og 25.05.2005

# Eivør nærum eiggiligasta sprund Íslands

**Í Íslandi hevur útvarpsstøðin Rás 2 havt atkvøðu um, hvør er eiggiligasta sprund Íslands. Eivør Pálsdóttir er nummar tvey á hesum topp 10 listanum og í fjør var hon nummar 10**

VAKURLEIKA-KAPPING

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sunnudagin var sonevndur kvinnudagur í Íslandi. Henda dag eru menn serstakliga góðir mótvegis kvinnum. Hetta er eitt slag av valentindegi í Íslandi.

Henda dag skipaði íslendska Ras 2 fyri atkvøðugreiðslu um, hvør er ársins eiggiligasta sprund í Íslandi. Í túsundatali av lurtarum, mest mannligir, atkvøða.

Í fjør var Eivør Pálsdóttir nummar 10 á hesum topp 10 listanum, hóast ymisk mótmæli, tí Eivør jú ikki er íslendsk, men føroysk.

Í ár gjørdist Eivør nummar 2 á hesum topp 10 listanum yvir eiggiligastu sprund Íslands. Hóast somu mótmæli aftur hava verið frammi hesaferð, so verur mest smílst at hesum, tí øll halda nógv av Eivør, sigur heimildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð.

Nummar eitt á topp 10 listanum er sjónvarpstíðindakvinnan Eyrún Magnúsdóttir.